gult cyan magenta svart



## DAGSINS MEINING

# Landsstýrið æruna av hurlivasanum

Dagrøktararnir fara kanska í verkfall mánadagin. Yvirmenninir á vaktarskipinum Brimli eru í arbeðssteðgi. Føroya Arbeiðarafelag hevur lýst blokadu ímóti kavaruddingini hjá Landsverkfrøðinginum. Truplar sáttmálasamráðingar eru fyri framman.

Hetta eru bara nakrar veruleikar í Føroyum í tí Harrans ári 2001, skrivaðir sum yvirskriftir. Allir hesir naknu veruleikar hava beinleiðis samband við Fíggjarmálastýrið og Lønardeildina í hesum aðalstýri.

Øll vita vit, at Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, hevur sett sær fyri at reka ein varliga fíggjarpolitikk. Hetta merkir m.a. at halda aftur í almennu útreiðslunum. Tá lønirnar eru tann stóra almenna útreiðslan, roynir hann at lora sum minst, og tað fær hann eisini rós fyri.

Men talan er ikki bara um lønir. Talan er eisini um at sýna diplomati, vera takstiskur, duga at síggja veruleikan frá fleiri síðum, verða framskygdur og sýna rættvísi móti teimum ymisku lønarbólkunum.

Um vit taka dagrøktararnar, sum hótta við verkfalli, kunnu vit spyrja, hví Fíggjarmálastýri hevur góðkent onkran sáttmála, t.d. tann hjá Hósvíkar kommunu, samstundis sum tað ikki ber til at góðkenna aðrar sáttmálar, hóast teir eru linari í krøvum, sambært tí sum Føroya Arbeiðarafelag sigur.

Vit hava ikki frætt um nakað aftursvar ella mótprógv úr glashúsinum á Argjum. Tað má tí merkja, at okkurt er um tað, og niðurstøðan má tí verða, at Fíggjarmálastýrið við Karsten Hansen á odda nú slóðar fyri verkfalli, so hundraðtals børn verða ikki ansað í næstu viku!

Brimlamálið vísir bæði vantandi virðing fyri yvirmonnunum og vantandi tilvitan um, hvat fer fram rundan um okkum. Lønin, Karsten Hansen bjóðar skipara og stýrimonnum, maskinovasta og maskinmeistarum, er so láturliga lítil, at heldur hann fram á hesi kós, so stinga óivað nógv í sekkin.

Allastaðni rundan um okkum eru hýrurnar langt omanfyri. Og so tosa vit um altjóðagerð, og at vit skulu vera uppi í frálandavinnuni her heima og aðrastaðni Sjálvandi eiga yvirmenninir á hesum skipum, sum verja sjómark okkara, sum skulu hjálpa og bjarga í lívshættisligum umstøðum, hava betri lønarsømdir.

Nú stendur frálandavinnan fyri stavn. Lønirnar í hesi vinnu eru høgar. Tað hoyra vit longu um. Vanligar skrivstovulønir eru kanska 50 prosent oman fyri ta løn, sum tær almennu Føroyar lata. Tað hevði verið spennandi at frætt, hvat Karsten & Co ger, tá bestu kreftirnar í føroysku umsitingini verða keyptar og lønirnar annars fara á glið!

Tá tað snýr seg um lønir, er ikki bara talan um bruttoløn, men eisini um tað, sum er eftir, tá tað almenn hevur fingið síni 75 prosent! Hevur borgarliga samgongan gjørt nakað fyri, at meiri liggur eftir í lummanum? Nei! (Var tað ikki Fólkaflokkurin, sum plagdi at siga, at "peningurin liggur best í lummanum hjá tí einstaka"?) Og tí kunnu vit staðfesta, at fullveldisstýrið hevur ikki gjørt tað minsta fyri at taka broddin av høgum lønarkrøvum og hørðum sáttmálasamráðingum í vár!

**Sosialurin**

## NØVN Í VIKUNI



### Sverri Egholm farin

Hósdagin tagnaði landskenda og bleyta røddin hjá Sverra Egholm, ein mentamaður um ein háls er ikki longur okkara millum. Sverri var útbúgvin bókavørður, men hann var kanska nógv meira kendur millum manna sum ein fjølbroyttur slóðbrótari fyri mentunnarvirksemi.

Sverri var ein sjónleikari av teim góðu, og hetta fylgdi honum eisini í gerandisdegnum í vanligum práti. Hann dugdi væl at siga frá, og tá neyðugt var, so lat hann seg í sjónleikarbúnan, og tá kundi sjálvt ein ó-skyldug og hálvkeðilig søga gerast spilllivandi og stuttlig.

Fjølbroytta mentunnarvirksemi hjá Sverra førdi hann víða um á mentunnarpallinum. Honum dámdi siðsøgu, honum dámdi yrkingar, honum dámdi bókmentir bæði í bundnum og óbundnum máli, og hann ríkaði eisini onnur við tí sum honum dámdi. Óteljandi eru greinarnar, hann hevur skrivað í føroyuskum bløðum um mentan og um mentunnaravrik, sum hava sagt honum nakað persónliga.

Í blaðnum í dag er seinasta greinin, Sverri skrivaði. Tað er ein føðingardagsheilsan til kenda Føroyavinin, svian, Björn Hagström, sum fyllir 80 ár í dag. Greinin er skrivað sama dag, Sverri doyði.

Sverri var tignarligur, tá hann skrivaði. Hann var góður við málið og líka mikið, hvussu lítið evnið var, hann tók upp, so var nakað hátíðarligt yvir tí. Hann hevði virðing fyri tí hann tókst við.

Politiskt so hoyrdi hann heima í Sjálvstýrisflokkinum, og hann var avgjørt ikki keðiligur, tá hann luttók á politiskum fundum. Kanska eitt sindur av einum idealisti. Og so hevði hann tað speiska við, sum kundi seta lív í eitt deydligt orðaskifti.

Sverri var ritstjóri á einum forvitnisligum riti, sum er komið út undan jólum seinastu árini. Tað var ritið Birting, sum skrivaði um siðsøgulig evni, bar yrkingar fram og stuttsøgur. Eitt rit, sum var ætlað til jólahugna og til umhugsunnar í nýggja árinum. Birting kom eisini úr í fjør.

Eisini var Sverri fyrr eisini ritstjóri á ritunum Glugganum, sum hevði sama innihald sum Birting. Sverri hevur skrivað og verið við at skriva eitt ørgrynni av ritverkum

Undan jólum var Sverri í útvarpinum, har hann so mangan hevði lagt rødd til sendingar, og greiddi frá, hvussu hann sendi jólakort út til vinir sínar. Hetta var ein sending, sum rættuliga vísti heita menniskjað, Sverra, og hvussu hann hugsaði um skyldfólk og vinir og tey, sum veruliga høvdu nakað at siga í lívi hans.

Friður verið við minninum.

**Jústinus**

---

†

Sagt verður frá, at góði maður, pápi, abbi og verfaðir okkara

**Sverri Egholm**

andaðist mikudagin 24. januar, 70 ára gamal.

Kistan fer úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum leygardagin kl. 18 og jarðarferðin verður úr Havnar Kirkju sunnudagin kl. 14.00

Tey, sum vilja minnast Sverra, kunnu lata eina gávu til Máf.

**Anna, Guðrun, Malan, Jóan Magnus, Eyðun og Øssur v/fam.**

---


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo

**Mentan:**
Birgir Kruse birgir@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo

**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254mm breið og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.




